# ótum síðum

bygdur í Pollandi, sleipaður til Føroya, har handverk-arar so gjørdu tað síðsta arbeiði.

Ein onnur fortreyt fyri globalisering er skjótt kommunikatión ella samskifti millum keypara og seljara, ella millum deildir í teimum stóru fyritøkunum. Her kemur internetið inn, sum hevur verið ein kollvelting á økinum.

### Arbeiðskraftin er minni mobil

Kapitalurin er væl globaliseraður, og fesjar runt fyri at ala profitt, helst har arbeiðskraftin er bílig, væl útbúgvin, lýðin og óorganiserað. Men arbeiðskraftin av góðum grundum ikki so mobil. Kapitalur eru ópersónlig tøl ella kontoupphæddir, sum kunnu sendast hvar sum helst uppá eitt mikrosekund.

Arbeiðskraftin eru livandi og skapandi menniskjur, sum hava eitt mál, eina mentan og eitt socialt netverk. Føroyingar hava tó í tíðum við stórum arbeiðsloysi verið noyddir at fara við norskum, íslendskum ella týskum skipum, hava róð út í Grønlandi, verið arbeiðsmenn hjá Pihl og søn í Danmark ella hondverkarar í Týsklandi. Til Danmarkar og onnur vestureuropeisk lond komu arbeiðarar úr Pakistan og Turkalandi í 1960-unum og 70-unum, gestaarbeiðarar ella fremmandarbeiðarar. USA og onnur lond hava í langa tíð roynt at skava tað best útbúgvnu arbeiðskraftina til sín gjøgnum "green-card" skipanir, og at mong lond uppliva tað sum eitt "brain-drain", ella eina burturflyting av teimum bestu heilunum.

### Minni leiklut til national-statin

Í samband við orðaskiftið um globalisering verður ofta sagt, at nationalstaturin, soleiðis sum vit kenna hann frá 1600-1700-talinum og frameftir, hevur mist sín týdning. Alment kann sigast, at í somu løtu tú fert uppí ein felagsskap, so gevur tú ein part at suverenitetinum til felagsskapin. Tað kundi verið NATO, EFTA, NAFO, IMF ella ST. Tað mista rásarúmið verður endurgoldið av øktari trygd ella meiri ávirkan á einum hægri støði. Í Europa er tað í okkara tíð ikki minst EU ella ES, sum er vaksið fram. Tað krevur eina politiska støðutakan, um limaskapur her ella har gevur fleiri fyrimunir enn vansar.



*Tað at mørkini millum lond opnaðust, ger at kapi-talstreymar og spekulatiónskapitalur ferðast frítt*

Tað er ikki í øllum førum nakað frítt ella lætt val.

### Nýggir karmar um mentan og umhvørvi

Tað kann diskuterast, um tað er rættast at siga at Verðin er blivin størri ella minni. Men eitt er vist og tað er, at eingilskt mál og amerikonsk mentan hevur breitt seg um allan heim. Internetmálið er í fyrsta lagi eingilskt, og tað er eisini tað málið, sum mest sum hevur status sum eitt lingua franca ella heimsmál. Amerikanskir filmir og sjónvarpsseriur koma út í hvønn krók, eisini í Føroyum, meðan fólkið drekkur cola og etur burgarar afturvið.

Summi trupulleikar kunnu ikki loysast lokalt ella nationalt. Eitt nú umhvørvisspurningar og veðurlagsbroytingar krevja, at atgerðir verða framdar um alla verð, ella í hvussu so er í stórum regiónum. Til dømis kann umhvørvið og fiskiskapurin í Eystrasalti ella Norðsjónum ikki klárast av einum einstakum grannalandi. Øll mugu ganga saman.

### Nýggjar politiskar uppgávur á øllum stigum

Tað er vert at leggja til merkis, at tey ríku londini í Vestureuropa, Norðuramerika og Japanhava ræði á heimsbúskapinum. Størsti partur av allari framleiðslu í heiminum fer fram í hesum regiónum, og nógv tann størsti handilin gongur fyri seg í hesum regiónum ella millum regiónirnar. Sidney Pollard nevnir, at 82% av allari vøruframleiðslu fer fram í hesum regiónum. 75% av heimshandlinum fer fram millum hesi ríku, framkomnu londini. Og talið er hækkandi; tað var bert 63% í 1960. **Mynd 1**, sum hevur nýggjari tøl, vísir nakað tað sama.

Heimurin er ikki globaliseraður meiri enn so, at hesar ríku regiónir verja seg við tollmúrum og øðrum reguleringum, sum ger tað torført hjá menningarlondum at sleppa framat. Eitt gott dømi er landbúnaðarskipanin í ES, sum er heimsins størsta "planøkonomiska" skipan í dag. Ætlanin var upprunaliga ikki at fremja vinnuliga kapping, men var lið í einum rossahandli, har franski forsetin de Gaulle skuldi tryggja ein i k k i - k a p p i n g a r f ø r a n franskan landbúnað, og so sjálvandi tær konservativu, borgarligu atkvøðurnar hagani. Landbúnaðarskipanin var, sum søgumaðurin Michael Seidelin citerar The Economist fyri: *"Det ultimativt mest idiotiske system, som den vestlige verden nogensinde har skabt."* Hesa skipan merkja føroyskir fiskimenn og fiskaalarar eisini væl. Teir standa uttanfyri, og mugu pent biða um loyvi at selja nakrar avmarkaðar nøgdir av fiski og alilaksi.

### Kapitalurin hevur ikki gloymt klassastríðið

Hugtakið "outsourcing" varð brúkt omanfyri. Men tað hevur eisini eina aðra og minni pena síðu, sum er ein partur av mótsetninginium millum arbeiðskraft og kapital. Sum dømi úr einum ríkum landi, vísir Sidney Pollard á, at lønirnar hjá vanligum arbeiðarum í USA hevur í longri verið fallandi. Í USA eru ótallig dømir um, at eitt nú bilídnaðurin brúkar fabriksflytingar til at pressa lønirnar niður. Bilídnaðurin flytir úr teimum norðaru statunum og frá høvuðsborgini Detroit til suðurstatirnar, har fakfeløg einki hava at siga. Til *"non-union, low-wage, no-benefit dead ends"* ella: til eina blindgøtu uttan fakfeløg, við lágari løn, uttan framtíð. Av hesum ávum er organisatiónsprocentið í amerikanskum fakfeløgum fallið frá 33% í 1950 til 14% í dag.

Tað er ikki bert ein gamal professari í søgu, sum Sidney Pollard, ið sigur so. Amerikanska konservativa peningablaðið Business Week leggur ikki fingrarnar ímillum, hvørki nú ella fyrr. Blaðið skrivar (061299), at seinastu 10-15 árini hevur US-ídnaðurin ført *"the most succesful anti-union wars ever, illegally firing thousands of workers for exercising their right to organize."* Teir hava ført eitt tað mest væleydnaða anti-fakfelags kríggi nakrantíð, og ólógliga (!) koyrt túsundtals arbeiðarar tí royndu at verja rættin at organisera seg.Eg komi at hugsa um ein hugsingarsaman mann, sum fyri 157 árum skrivaði nøkur vísdómsorð um at standa ella saman!

### Nøkur føroysk loysn?

Tað kann sigast rættiliga einfalt. Kendir politikkarar um alt Europa eru samdir um, at vegurin fram er útbúgving og gransking. Romano Prodi, fyrrverandi kommissiónsformaður í ES, Tony Blair í Einglandi, Lykkegaard og Fogh í Danmark brúka trý orð: Útbúgving, útbúgving og útbúgving. Er hetta vegurin í Føroyum? Hvussu skal henda visión praktiserast í Føroyum?

Kanska koma nøkur boð, tá Landsstýrið í maj fer at leggja eina ætlan fram.

> *one of the most succesful anti-union wars ever, illegally firing thousands of workers*
>
> Business Week

Keldur:
Doug Henwood: "What is globalization anyway?" <www.igc.org.solidarity/henwoodonglobalization>
Follow the yellow BRIC road. <Economist.com>, 091003
Johan Mortensen: "Um tíggju ár er ongin flakavinna eftir…"Sosialurin 010205
Leksikon for det 20. <www.leksikon.org>
Michael Seidelin (2004): "Den stenede vej mod Unionen. Tiderne Skifter. København
Peter B Sørensen,: "Globalisering" Børsen, 070205
Sidney Pollard (1997): "The international Economy since 1945" Routledge. London

## Metár hjá Statoil

Norska Statoil hevur eitt framúr gott ár í fjør. Ikki minni enn 24,9 mia norskar krónur vóru eftir, tá allar útreiðslur, skattur og avskrivingar vóru drignar frá, og er hetta besta úrslitið, sum fel agið nakrantíð hevur havt.

Sammett við 2003 var talan um eina betran av úrslitinum á 50%, og hetta var so sanniliga eisini nakað, sum partaeigararnir fingu at merkja. Vinningsbýtið, sum felagið lat í ár, var 5,30 kr. fyri hvørt partabrævið, ella eini 10 mia norskar krónur.

Sum kunnugt, so er Statoil eisini millum feløgini, sum aktiv í oljuleitingini við Føroyar, og eisini hesum viðvíkjandi eru áhugaverdir lutir at finna í ársfrágreiðing felagsins. Millum mest týðandi í árinum nevnir felagið Rosebank fundið skamt frá føroyska markinum, og ikki minst leitloyvini, sum felagið fekk tillutað, tá úrslitið av øðrum útbjóðingarumfari fyri stuttum var almannakunngjørt í Føroyum.

-jm